# ítróttur

Nr. 223 • mánadagur • 21. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


Michel Platini:

# - Smáar tjóðir hava týðandi leiklut í fótbóltinum

**Franski bóltsnillingurin Michel Platini, sum vitjaði í Føroyum um vikuskiftið, heldur tað verða umráðandi fyri menningina av fótbóltinum kring heimin, at smáar tjóðir sum til dømis Føroyar eru við í altjóða fótbólti og dystast við stórar tjóðir**


PLATINI-VITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Fleiri av teimum størru tjóðunum, ið taka lut í altjóða fótbólti, finnast mangan at, at smærri tjóðir, so sum Føroyar, Andorra, San Marino og Liktenstein, taka lut í altjóða kappingum á jøvnum føti við stóru tjóðirnar. Summar av stóru tjóðunum hava ført fram, at tað hevði verið eitt hugskot at lata smærru tjóðirnar royna seg í einum slagi av einum undanumfari til eitt nú EM- og HM-undankappingar. Men hesum er Michel Platini ikki samdur í.



*Michel Platini heldur tað verða bert eittans lið, ið kann vinna HM-heitið í fótbólti komandi summar, og tað er Brasil. Platini sá liðið spæla Confederations Cup fyrr í ár, og fraklendingurin heldur, at tað er besta liðið, ið hann hevur sæð seinastu 20-30 árini*

Mynd: Jens Kr. Vang

**Menningin alt at siga**

- Eg kenni væl hasi sjónarmiðini, men eg eri ikki samdur í teimum. Tað vilja altíð verða sterk og veik lið í undankappingum, og tað verður ikki øðrvísi. Tað hevur eisini ómetaliga stóran týdning fyri menningina av fótbóltinum, at stórar tjóðir vitja smærri tjóðir. Tá ið til dømis franska landsliðið kemur her til Føroya at spæla, er tað jú ein stórhending, ið ger so ómetaliga nógv gott fyri áhugan fyri fótbólti her á landi. Børnini sleppa at síggja nakrar av stóru hetjunum hjá sær, og slíkt hevur sera stóran týdning fyri menningina av fótbóltinum. Um børnini ongantíð sluppa at uppliva sínar hetjur, hevði áhugin kanska verið køvdur, heldur Michel Platini.

Fraklendingurin sigur seg tískil vóna, at skipanin, soleiðis sum hon er í dag, heldur fram, tí eftir hansara tykki er talan um eina góða skipan, sum er góð fyri menningina av fótbóltinum.

Eisini vísir Michel Platini á, at fleiri lutfalsliga smærri tjóðir hava vunnið sær rætt til at taka lut í HM-endaspælinum í Týsklandi komandi summar. Hann nevnir í hesum sambandi Togo, Angola umframt Trinidad og Tobago.

**Brasil stórfavorittur at vinna HM**

Tá ið tosið kom inn á HM-endaspælið í Týsklandi komandi summar, settu vit Michel Platini spurningin, um hvør ið hann metti fór at vinna heimsmeistaraheitið.

- Í mínari verð er tað bert Brasil, ið kann vinna. Teir eru í serflokki eftir mínum tykki. Eg sá brasilska landsliðið spæla Confederations Cup í Týsklandi fyrr í ár, og tað var heilt fantastiskt, hóast teir ikki høvdu allar av sínum bestu spælarum við. Eg haldi, at tað er tað besta liðið, ið eg havi sæð í eini 20-30 ár. Tá ið tú sum venjari stendur og ivast í, um tú skalt hava Ronaldo ella Adriano í álopinum frá byrjan, tá hevur tú ein hóp, har eingin annar stendur mát, heldur Michel Platini.

Franska landsliðið er sambært Platini ikki eins sterkt og tað var í 1998 og 2000, tá ið liðið vann ávíkavist HM og EM, og tí trýr Platini ikki upp á franskt gull í Týsklandi.

# Cruyff var fyrimyndin

**Allir fótbóltsspælarar og fótbóltsfjepparar annars hava ein ella annan spælara, ið er teirra stóra fyrimynd. Soleiðis er eisini hjá Michel Platini, sum hevði hollendska Johan Cruyff sum sína stóru fyrimynd.**


PLATINI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Á tíðindafundinum í FSF-húsinum fríggjadagin var Michel Platini millum annað spurdur, hvør ið var besti spælarin, ið hann nakrantíð hevur spælt saman við ella ímóti:

- Eg havi verið á vølli saman við nógvum framúr góðum spælarum, men eg haldi, at tann størsti av teimum øllum er Johan Cruyff. Tá ið hann spældi sín seinasta dyst, ein sonevndan „avskeðsdyst" við útvaldum leikarum, var eg við, og tí slapp eg at spæla saman við honum í 45 minuttir. Tað var heilt ótrúligt, tí hann var øll míni ungdómsár mín stóra fyrimynd, segði Michel Platini.

Annars hevur Platini spælt móti og saman við so frægum spælarum sum Diego Maradona, Paolo Rossi, Jean Tigana, Karl Heinz Rummenige og øðrum, men Cruyff er tann, ið hann sjálvur heldur verða tann besta av teimum øllum.



*- Eg havi verið á vølli saman við nógvum framúr góðum spælarum, men eg haldi, at tann størsti av teimum øllum er Johan Cruyff, segði Michel Platini*

Mynd: Jens Kr. Vang

## Vágamenn spenna seg út

**Tveir ungir hvalbingar hava gjørt avtalu um at spæla við FSV04 næsta ár, og felagið roknar við, at avtala eisini fer at verða gjørd við aðrar ungar spælarar**


FSV04
*Jóannes Hansen*


Í Sandavági arbeiða teir av lívsins kreftum við at fyrireika seg til næsta kappingarár. Sambært heimasíðuni hjá felagnum, so verður málið at vinna næstbestu deildina og harvið at flyta upp í fremstu røð. Í ár endaði FSVágar04 á bronsuplássinum.

Undan vikuskiftinum kom fram, at felagið hevur gjørt avtalu við teir flestu, sum í fjør vóru á liðnum, og at onkrir nýggir spælarar eru komnir afturat. Felagið metir tað vera av alstórum týdningi, at teir, sum higartil hava borið besta fótbóltsliðið, eisini næsta ár vera botnur á liðnum.

Í síðstu viku gjørdi FSV04 avtalu við Poul Poulsen og Hilmar Sveinbjørnsson. Talan er um tveir ungar hvalbingar, sum higartil hava spælt við Royn. Nú skulu teir ferðast úr Havnini og vestur á Valloyruna at venja og spæla við FSV04.

Í FSVágar04 verður sagt, at teir framvegis arbeiða við at styrkja uppaftur meiri um liðið.

Bill Jacobsen verður eisini næsta ár venjari í Sandavági, og fyri stuttum gjørdu teir avtalu við Rúna Elttør, sum áður hevur spælt í KÍ, B36 og ÍF.

HB unglingaspælarin Ólavur í Ólavstovu spældi eftir summarfrítíðina í ár við FSV04. Hann hevur boðað frá, at tað er ivasamt, um hann fer at halda fram í Sandavági, men nevndin í FSV04 sigur, at tað harvið ikki er sagt, at hann ikki fer at spæla, og at teir í felagnum vóna, at tað fer at bera honum til at halda fram.